LM-099/2023

Kylgiskjal 7

Selatrað 18-02-2024

Til Landsstýrismannin í Uttanríkis- og Vinnumálum, Høgna Hoydal

Hoyringssvar í samband við uppskot til løgtingslóg um burðadygga ferðavinnu

Eg eri bóndi, og vari av einum garði á 5,5 merkur. Okkara familja hava umsitið festið samvitskufult í góð 200 ár.

Eg havi ikki havt stórvegis trupulleikar, við gongd í mínum haga, hóast tað eru nógvir føroyingar, ið ferðast í mínum haga. Einstaklingar fara sum oftast sjálvir, uttan at biðja um loyvið, men eru tað bólkar, ið fara, ringja tey altíð fyrst og spyrja um loyvið og eg havi ongantíð nokta nøkrum at fara í hagan. Tá ið hesi hava ringt, fyri at biðja um loyvi, havi eg mangan vegleitt teimum, um hvar og hvussu tey skulu ganga. Sjálvur haldi eg, at hettar hevur verið ein fín skipan, og havi eg ikki tjent eina krónu upp á hettar.

Eg dugi væl at síggja, at um ferðafólk og bólkar gingu dagliga í mínum haga, uttan vegleiðing um, hvar og hvussu tey skuldu ganga, hevði tað skjótt gingið galið, tí so hevði seyðurin hjá mær allarhelst fari av haga, og hettar hevði fingið óbótaligan skaða, fyri mín seyð. Seyðurin hevur jú tillagað seg í øldir og hevur fingið frið, at ganga har í øldir.

Uppskot til tykkum, ið skulu avgera lagnuna hjá okkara aldargomlu siðvenju og seyðamentan og stuttfluttan mat

Sum áður sagt, so hevur verandi lóggáva ikki forða fyri hvørki landbúnaði ella ferðavinnu í okkara haga ella í okkara umhvørvi, men um tit nú endiliga skulu fremja broytingar og taka kjansin við at seta uppá spæl okkara aldargomlu siðvenju, mentan og arbeiðshátt, so havi eg eitt alternativt uppskot til tykkum, ið møguliga kann vera ein loysn, har vit framhaldandi kunnu hava bæði ferðavinnu og landbúnað til frama fyri allar føroyingar og ikki minst fólk á staðnum úti umkring landið.

- Fyrst av øllum, skal øll uttangarðsjørð í Føroyum friðast, á tann hátt, at tað bert skal vera loyvt, at ganga eftir bygdargøtunum. At fara av bygdagøtuni skal sektast við bót.
- Tó skal bera til at ganga aðrastaðnis, um ein hevur eitt náttúruloyvi.
- Náttúruloyvið, kundi verið umsitið, á sama hátt sum vápnaloyvini. Allir føringar yvir, eitt nú 16 ár kundu søkt um tað - á sama hátt, sum við vápnaloyvinum.

Føroyingar, undir kravaldurin, fyri at søkja um náttúruloyvi, skuldu harafturímóti fingið undirvísing/skeið, í fólkaskúlanum, um alt tað týdningarmikla man skal vita, fyri at kunna ferðast í føroysku náttúruni, á skynsaman og tryggan hátt. Her hugsi eg um: mjørka, regn/ættir, brattlendið, seyð, haruskjóting, fjallgongu og so eisini alt tað praktiska, ein skal vita, áðrenn ein fer út í hagan.

Eftir lokið skeið í fólkaskúlanum fáa so, allir 16 ára gamlir føroyingar, eitt náttúrloyvi, ið kann brúkast, um man ætlar sær út í náttúruna, har ongin bygdagøta er.

Við einum náttúrloyvi, kundi man fingið loyvið at gingið í føroysku náttúruni einsamallur, og eisini skuldi tá verið loyvt, at fari ein túr saman við øðrum í hagan, útlendingum ella ikki, tó ikki vinnuligt, tá krevst meira.

Við hesum, høvdu vit loyst allar møguligar trupulleikar við gongd í haga, fyri allar føroyingar.

Útlendsk ferðafólk?

Um ferðafólk á vinnuligum skipaðum túrum skulu út í føroysku náttúruna, uttanfyri bygdargøturnar, skulu tey vera saman við einum føroyingi, ið hevur loyvið, at ganga við ferðafólki í haganum. Hesin føroyingurin, skal hava eitt víðkað náttúruloyvi fyri at kunna ganga við ferðafólki í føroysku náttúruni - uttanfyri loyvdu bygdargøturnar.Eitt víðkað náttúruloyvið kann tann fáa, ið hevur góðkenda ferðavinnuútbúgving, ella tí viðkomandi er staðkendur, eitt nú eigari ella festari av jørðini. Útbúgvingin hevði givið generelt loyvið til allar Føroyar, ímeðan tey staðkendi, bert til tað økið, har tey vóru staðkend.

Við hesi skipan, høvdu ferðaleiðarar við víðkaða náttúruloyvinum, sett seg í samband við meg, sum festara, um teir skuldu í mín haga. Harvið kundi eg lættliga kunna samskifta við viðkomandi um, praktisk viðurskifti í júst mínum haga júst tað tíðarskeið, teir ætla sær túr við ferðafólkum.

Hetta stuðlar mær sum bóndi, soleiðis at eg kundi stýrt gongdini í mínum haga á skynsamasta hátt, tí at ferðafólkini, sum ætlar sær í náttúruna, hava ein føroyskan ferðaleiðara, sum hevur ráðført seg við bóndan á staðnum, sum veit alt um, hvat árstíðin hevur við sær av staðbundnum aktiviteti og røkt í júst hesum haganum. Hetta vildi forða fyri, at ferðafólk við føroyskum ferðaleiðara, ikki eru til ampa ella koma sær í støður, har tey órógva eitt nú lembing, fjallgongu, haruskjóting osv. Alternativt kundi eg sjálvur, ella annar staðkendur, bjóða meg fram sum ferðaleiðara.

Hví skal kommunan hava avgerðarrætt og skyldir?

Vit hava ongantíð tikið gjøld fyri, at fólk sum heild brúka okkara haga til náttúruupplivilsir, og er okkara hagi heldur ikki ein av teimum hagum, sum ferðafólk leita sær til í stórum mongdum, og tí sæst heldur onki slit í okkara haga. Men hetta er tó ein trupulleiki fleiri staðni í Føroyum, og tá kundi kommunan verið ein viðleikari hjá staðbundnu bøndrunum, við at hjálpt til at gera gøtur, skelti, vesiumstøður, portur og parkering.

Sjálvandi kennir bóndin best, hvar hvør steinur liggur í sínum haga og hvussu allur rakstur av haganum og aktivitetur í haganum, best skal skipast, og tí tykist tað mær hugstoytt, at uppskotið leggur upp til, at bóndin skal ráðføra seg saman við kommununa um, hvussu ferðafólk eiga at ferðast í hagapartinum, sum hoyrir til tað festið.

Sambært § 4 áliggur tað kommununi, at gera eina ætlan og skal hon gera hetta í samráð við festara/eigara. Hetta vendir púra skeivt. Hetta eigur ikki at vera ein skylda, og um nakar skal gera eina ætlan, so er tað festari ella eigarin.

Havast skal eisini í huga, at ein kommuna og tey sum hava jørð, vera mótstríðandi partar og kunnu hava fullkomiliga ymiskar áskoðanir, og hava tað longu í dag, eitt nú viðvíkjandi vetrarfriðing. At so nakrir tilvildarlig valdir kommunustýrislimir, ið einki hava við, hvørki ferðavinnu ella landbúnað at gera, skulu hava, ikki bert ábyrgd, men skyldu til, at avgera hvussu landbúnaðarjørðini skal avmarkast í mun til ferðavinnuna, er burturvið. Um nakar, so skuldi tað sjálvandi verið tann sum varaði av haganum, ið kennir hagan og umstøðurnar best, ið hevði henda møguleikan.

Ongin ivi kann vera, at føroyskir bøndur eru eitt erri og eldhuga fólkaslag, sum eftir besta førimuni umsita og røkja sini festið, og tí skal avgerðarrætturin í málum, ið viðvíkja festinum/ognini, altíð liggja hjá bóndanum.

Leikluturin hjá kommununi kann vera ein samstarvspartur hjá bóndanum, og at stuðla nærumhvøvinum, við at skapa karmar og praktiskar loysnir, soleiðis at ferðavinnan kann trívast saman við teimum lokalu fólkunum - og harvið fáa fleiri inntøkur í kommunukassan.

Boða frá

Sambært uppskotinum, verður tað nú lagt upp til, at tann sum situr við jørðini, skal boða frá. Hetta vendir heilt skeivt. Tað er sjálvandi tann sum kemur inn á annan mans ogn, ið skal boða frá. Vit sum hava siti við jørðini og hava røkt jørðina í øldir og framleitt stuttfluttan mat, vit skulu sjálvandi ikki boða frá okkara vanliga rakstri av haganum. Tað er má framvegis vera skyldan hjá teimum, ið ætla sær at vitja, at boða frá og spyrja um loyvi.

Tí er skilabesta loysnin, at venda hasum partinum í uppskotinum til, at ferðaleiðari við víðkaðum náttúruprógvi, eigur at venda sær til bóndan fyrst og ráðføra seg um veður, vind, lendi og aktuellan aktivitet í haganum, og síðani leggja túrin til rættis sambært hesum.

VH
Klæmint Mittún
Bóndi á Selatrað